# Oddagrein

Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo



# HEIMURIN LIGGUR OPIN

Í dag byrjar eitt nýtt kapittul hjá 628 seks-sjey ára gomlum føroyingum, tí í dag fara hesi fittu børnini - við leysum tonnum og tómum skúlataskum - tysjandi so forvitin og spent í skúla á fysta sinni.

Og tað er av sonnum ein stórur dagur hjá hesum smáu - nú heimurin liggur opin fyri føtur teirra. Tey hugsa ikki um sparingar á skúlaøkinum, um samanlagdar flokkar og burturspardar tímar. Nei, hesir trupulleikar eru ikki teirra - og teir verða heldur ikki teirra enn á sinni. Nú byrjar eitt nýtt tíðarskeið, eitt tíggjuáraskeið, har tey skulu nema sær kunnleika til víðari lívsleið sína.

628 næmingar eru næstan hundrað færri enn í fjør, tá 725 fóru í skúla á fyrsta sinni. Hóast burðartølini ikki á hvørjum ári eru tey somu, so er tað altíð hugaligari, tá talið veksur, enn tá tað minkar.

Hóast hesi 628 børnini byrja í skúlum kring alt landið, so fer næstan helmingurin, 297 ella 47,3 prosent av teimum í kommunalu skúlarnar í Havn, og um vit telja teir næmingar við eisini, sum fara í teir báðar privatu skúlarnar, Frískúlan við Hoyvíkstjørn (Adventistaskúlan) og Fríkskúlan á Velbastað, so man fara at líða væl, at helmingurin av nýggju skúlabørnunum búgva í Tórshavnar kommunu. Talið av børnum, sum bryja í Tórshavnar kommunu er eisini lækkað nakað í mun til í fjør, tá talið var 306. Men talið er lutvíst hækkað, tí meðan tey í fjør vóru 42 prosent, so eru tey í ár 47 prosent.

Samstundis sum skúlarnir byrja aftur, so fer ferðslan á vegunum - og ikki minst á skúlavegunum - aftur at økjast. Hetta eiga vit øll, sum ferðast í ferðsluni at hava í huga - og geva serligt gætur. Hesi smáu eru ikki von við skúlavegirnar, og kenna av góðum grundum ikki nóg væl vandarnar í ferðsluni.

Tilsamans 6865 næmingar ganga nú í føroyska fólkaskúlanum. Síðsta skúlaár var talið 6920 og árið fyri 7061.

Hjá børnum og foreldrum er fyrsti skúladagur eitt av størstu vegamótum í lívinum. Á hvørjum ári senda vit hundraðtals av hesum smáu fittu børnunum út í skúlarnar við gyltum vónum um, at tey fáa eina góða skúlagongd við nógvum góðum upplivingum.

Skúlin skal vera eitt gott stað at vera, tí her fáa børnini og ungdómurin sítt mentanarliga og menniskjansliga kjølfesti, sum tey skulu víðari í lívinum við. Tí ynskja vit lærarum og børnum bestu ynski um eitt gott skúlaár.



**Skúlin skal vera eitt gott stað fyri børn og lærarar**

## Skipsportalurin aftur við skipsmyndum

Skipsmyndirnar eru nú aftur á breddanum á Føroyska Skipsportalinum, www.skipini.com.

Eftir at hava arbeitt upp á hesa tænastu á skipsportalinum í yvir eitt ár, hava stigtakararnir nú gjørt sítt arbeiði, og nú eru skipsmyndirnar aftur á breddanum.

Við yvir 450 myndum kann Føroyski Skipsportalurin nú vísa sína samling alment út til lesararnar. Aðrir fjølmiðlar, ið hava tørv á einari skipsmynd eru vælkomnir at nýta myndirnar hjá www.skipini.com, men hettar kervur tó at vísa til keldu.




Teir ið hava arbeitt upp á skipsmyndirnar alla hesa tíð eru teknikarin Sverri Egholm, og mynda- og tíðindamaðurin Kiran Jóanesarson. Tann triði Bárður Michaelsen, hevur ikki so nógv við skipsmyndirnar at gera, men tekur sær av myndasavninum. Við myndasavninum kann nevnast at myndir frá Regatta í Hósvík nýligani eru lagdar inná skipini.com.

Teir tríggir aftan fyri Føroyska Skipsportalin siga seg vera spentar uppá, hvussu skipsmyndirnar vera vitjaðar, og vænta at talið fer mundandi nógv upp.

## Rætting til fríggjadagsblaðið

Av misgávum varð navnið á fotografinum, sum hevði tikið myndir til til høvuðssøguna, ikki við í blaðnum fríggjadagin.



Myndirnar vóru tiknar í sambandi við upptøkurnar av stuttfilminum Magma, sum Marianna Mørkøre og Rannvá Káradóttir eru farnar undir, og sum longu er umbiðin av fleiri filmsfestivalum. Myndatøka og viðgerð varð gjørd av Katrin Svabo Bech, og Marianna Mørkøre og Rannvá Káradóttir hava fullan ognarrætt av myndunum.



**Svimjihylur raðfestast høg**

JÓGVAN ARGE KJAK SÍÐA 28



**Kunst, Kinna og Carli-Kalkun**

OLE WICH
KJAK Á SÍÐU 14

## Føroysk neyðhjálp til Pakistan



Uttanríkisráðið hevur latið 150.000 krónur í neyðhjálp til Pakistan, sum er rakt av ræðuligari vatnflóð.

Suni Vinther, formaður í Reyða Krossi Føroyar, segði við Rás2 fríggjadagin, at hóast herviligar myndir, so hava neyðstøddu fólkini ikki fingið stórvegis hjálp úr Norðurlondum.

Aftaná vanlukkuna í Haiti, savnaðu føroyingar gott og væl 1.2 milliónir krónur í neyðhjálp. Landsstýrið gav eisini 150.000 krónur í hjálpararbeiði.

Súni Vinther segði við Rás2, at munurin á vanlukkuni í Haiti og í Pakistan er, at miðlarnir hava ikki varpað eins nógv ljós á Pakistan.

Nú hevur Uttanríkisráðið, umvegis Reyða Kross Føroyar, veitt Pakistan stuðul. Peningurin fer til telt, køksútbúna og útgerð at fáa reint vatn.

ST upplýsir, at fleiri enn 1.200 fólk hava latið lív, og tvær milliónir fólk hava mist hús og heim. 14 milliónir fólk eru rakt av vanlukkuni, sum hevur oyðilagt grøðina, vegir og brýr.

Pakistan hevur 170 milliónir íbúgvar.

Politikken skrivaði fríggjadagin, at hjálparfelagsskapirnir skulu verða varnir við at spyrja um stuðul frá fólki, tí tað tykist sum, at fólk eru troytt av at lata pening til fólk í fjarskotnum londum.

Sosialurin Tel. 341800 www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

Marknaðardeild
lysing@sosialurin.fo

**Tórshavn** Tórsgøta 1, Postboks 76, 100 Tórshavn
tel. 341800, fax 341801, post@sosialurin.fo

**Norðoyggjar** Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687, klaksvik@sosialurin.fo

**Suðuroy** tel. 375364, fax 375464, tel. 228814,
aki@sosialurin.fo, dagfinn@sosialurin.fo

*Haldarar, sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja tel. 341818 frá kl. 8.00 til 20.00 og boða frá.*